




# Ein virkin politisk leiðsla



RODMUNDUR NIELSEN
Fólkaflokkurin

Umráðandi er, at Føroyar fáa eina virkna politiska leiðslu, sum kann eyggja til framfýsni og samvinnu í øllum pørtum av samfelagnum. Einstaki borgarin, einstaka virkið og vinnufeløgini skulu hava góð kor at arbeiða undir.

Tí er eisini neyðugt við tiltøkum, sum strimbra íløgur, útflutningi og vinnu, men samstundis varðveitur og mennir valferðarsamfelagið og tryggjar, at byrðarnar verða javnaðar so gott sum gjørligt.

Neyðugt er tí við einari politiskari skipan, har fíggjarlig og sosial ábyrgdarkensla ikki verða settar upp ímóti hvørjari aðrari, men sum tvinnandi síður av somu søk. At loysa hesar felags uppgávur eru m.a. hesar leiðir gongdar:

Neyðugt er at seta í verk tillaging av skatti og almennu gjøldum, so at hetta kann eggja til størri arbeiðshug og at fólk fara at tora at gera íløgur.

Ein inntøkupolitikk, sum komið verður fram til við samráðingum má skapa fyritreytir fyri at halda fast um, at kostnaðarstøði - eisini í framtíðini, verður lægri enn hjá okkara týdningarmestu handilssambondum.

Men fyritreytin fyri hesum er ein framskygd álítandi politisk leiðsla, sum er før fyri at fáa í lag skilagóða hjálp frá arbeiðsmarknaðinum og vinnulívinum. Til ber hvørki at taka størri partar burtur úr øllum tiltøkunum ella at trótandi samarbeiðsvilji skal valda hjá umráðandi tættum í samfelagnum uttan at fíggjarliga heildin og sosiala javnvágin kemur í vanda.

Vit hava brúk fyri einari álítandi virknari politiskar leiðslu.

# Tjóðskaparligt og persónligt frælsi



POUL MICHELSEN
Fólkaflokkurin

Frælsið hjá tjóðini og hjá einstaklinginum hongur saman. Føroyar skulu vera ein sjálvstøðug tjóð, har rúm er fyri okkum øllum. Persónliga frælsið er ein av hornasteinurin undir liberalistisku hugsjónini. Vit eiga at vísa frílyndi og tolsemi og stremba eftir at tryggja øllum í Føroyum tey rættindi, ið eru fevnd av altjóða sáttmálum. Hetta er besta fortreytin fyri einum nýmótans og mennandi vinnulívi.

# Ein rødd, ið hoyrist – eisini á tingi



MARIA JACOBSEN
valevni hjá Tjóðveldi
www.tjodveldi.fo/maria

**Hjartamál míni:**

***Almannamál:***

Barnaverndarlógin skal broytast við atliti til rættartrygd barnanna

Barnaumboðsmaður skal setast á stovn

Rættartrygdin hjá fólki við menningartarni og breki annars skal styrkjast

Rúmligi arbeiðsmarknaðurin skal skipast við kvotu fyri almenn arbeiðspláss

Fólkapensjónin og fyritíðarpensjónin skulu endurskoðast og hækkast

Styrkjast skal um korini hjá støkum uppihaldarum

***Skúlamál:***

Karmarnir hjá fólkaskúlanum skulu nútíðargerast

Byrjast skal beinanvegin at byggja nýggjan miðnámsskúla í Havn

Játtanin til Fróðskaparsetrið skal økjast og fleiri útbúgvingar setast á stovn

***Arbeiðaramál:***

Ófaklærdir arbeiðarar skulu hava møguleika fyri førleikamenning

Rættindini hjá sjómonnum at fáa útgjald úr ALS skulu staðfestast

Sjómansskatturin skal varðveitast

***Revsimál:***

Revsingin fyri kynsliga misnýtslu av børnum skal herðast

Tey, ið dømd eru fyri kynsliga misnýtslu av børnum, skulu ikki kunna starvast við børnum

***Løgtingsskipan:***

Løgtingsumboð skulu ikki hava annað starv, meðan tey er vald á ting

Ikki skal bera til at sita á løgtingi og fólkatingi samstundis

Tekur tú undir við hjartamálum mínum, so eri eg ein møguleiki á løgtingsvalinum hin 19. januar.

# Bummgjald



HEINI O. HEINESEN
fyrv. løgtingsmaður

Tað sum kostar nógvan pening skal skattaborgarin gjalda, meðan, tað sum gevur pening í alla framtíð, verður latið til eitt privat partafelag at byggja og reka.

Tað hevur verið nógv orðaskifti um bummgjald í samband við gjøgnumkoyring av undirsjóðartunnlum. Tað var ein kanning gjørd umleið 1986 -87 yviri í Noreg. Henda kanning var brúkt í sambandi við at farast skuldi undir at gera Vágatunlinum í 1988.

Henda kanning vísti, at tað var bert í einum stað í Føroyum, tað loysti seg at krevja bummgjald, soleiðis at hetta var til rímiligan prís. Tað var á innkoyrinarvegnum til Tórshavn. Henda ferðsla er meira enn 10 falda síðanni tá.

Úrslitið av hesu kanning gjørdi, at avgjørt var ikki at krevja bummgjald í samband við vágatunnilin. Tað var komið so langt í 1988 -89 at klárt var at skjóta fyrsta skoti. Av tí at fíggjarkreppa var við at taka seg upp í landinum var arbeiðið støðg, til fyrimuns fyri gomlu Rætt. Samstundis sum tað var stórt arbeiðsloysið í landinum.

Ein eftirmeting var gjørd av Vágatunnlinum í sambandi at Norðoyatunnilin skuldi latast upp fyri ferðslu. Henda kanning vísti, at tað koyra meira bilar til Vestmanna, enn ígjøgnum Vágatunnilin. Tað búgva umleið 1200 fólk í Vestmanna og umleið 3000 fólk vesturi Vágum. Herafturat kemur ferðslan til og frá flogvøllinum.

Nú er talan um at gera tunnil inn á Skálafjørðin. Hesin kann geva inntøkur í alla framtíð, uttan at gerða skaða fyri nakað virksemi. Sambært tí ætlan sum ABC samgongan hevur, skal hetta business projekt leggjast til eitt privat partafelag, at byggja og reka. Hetta er ein peningamaskina sum kundi gjørt tað, at øll í Føroyum kundi koyrt ella silgt til havnar, fyri sama kostnað. Tað skuldi bert verði tvær gjaldstøðir tá koyrt var ígjøgnum, ein á norðurleiðini og ein á suðurleiðini.

Politikkurin hjá ABC samgonguni er, at tey prosjektini sum kosta nógvan pening skal skattaborgarin gjalda, meðan tey sum kunnu geva pening í alla framtíð, vera latin til eitt privat partafelag. Uppá longri sigt kann peningamaskinan skálafjarðartunnilin, verða við at gjalda fyri víðari útbyggjingar av samferðslunetinum í Føroyum.

# „Pissa bara í buks!“



ELIN VANG
Fólkaflokkurin

**Líkasæla er verri enn vanvirðing**

Tað var við stórari sorg, at eg las um pápa Rúnu F. Holm í Sosialinum 8. jan.

Umleið 100 føroyingar verða raktir av heilaskaða árliga og koma sostatt ígjøgnum sjúkrahúsverkið.

Í tí akuttu perioduni er als eingin líkasæla. Har verður sett alt inn á ein hátt, sum vísir, at um vit bert kendu tann partin av sjúkrahúsverkinum, høvdu vit meint, at hetta mátti vera verðins besta sjúkrahúsverk. Men so er eisini alt sagt!

Fyri hesar lívbjargarar er sjálvur andadrátturin týdningarmiklari enn sjálvt lívið hjá hesum nú heilaskaddu. Hvøkkurin hjá avvarðandi gerst stórur, tá tey nú uppliva ta líkasælu, sum valdar, tí sjúkrahúsleiðslurnar, sum fyrst spardu reingerðina niður, so hon gjørdist ein stór skomm, halda nú áfram við sparingum á røktarøkinum.

Tað er júst hesi viðurskifti, Rúna skrivar um. Tað mest mannminkandi í verðini er, tá røktarstarvsfólkið, sum tú ert bundin av, sigur: ”Pissa bara í buks!” Hetta kann bara hann føla, sum hevur roynt tað. So kemur dagurin, tú skalt útskrivast í morgin. ”Jamen, jamen!” ”Einki jamen, vit bjargaðu tínum andadrátti. Tað má vera nokk. So út.” Heimafturkomin: ”Hvat so?“ „Hvar skal eg fara? Hvønn veg skal eg ganga? Hvat skal eg liva av? Hvørji eru tey, sum ganga rundan um meg? Hví síggi eg ongar litir longur? Hví kann eg ikki ganga? Hví kann eg ikki tosa?”

Her eru als ongi skipað og lógarfest tilboð til henda stóra skara av føroyingum! Ongin neurologiskur lækni við skil fyri heilaskaðum, eingin neuropsykologur, sum er tann besti á økinum at samskipa heilan og kroppin aftur. Tað finnast eingi ergo- og fysioterapeutisk almenn tilboð til heilaskadd. Tað finnast ongi psykologisk tilboð til heilaskadd og teirra avvarðandi, hóast tað finnast útbúgvin fólk bæði í Føroyum og Danmark.

Í longdini hevði hetta spart almennu Føroyum pengar. Heldur tú eisini, at hetta skal broytast nú?

So vel Elin Vang á lista A